Simon Kvamm á Planet Awards:

# Føroyar er sum narkotika – og eg havi brúk fyri at fáa Føroyar í æðrarnar

**Nephewsangarin Simon Kvamm verður við á Planet Awards, har hann skal handa eina av virðislønunum. Hann gleðist um høvið at sleppa aftur til Føroyar, ið hann hevur fingið, nú Nephew eru í uppskoti til planetina fyri besta útlendska**

PLANET AWARDS
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*




*Føroyar fór undir húðina hjá øllum limunum í Nephew, sigur Simon Kvamm*

Kendasti maður í Danmark við genum úr Gøtu Simon Kvamm sigur, at Føroyar er eitt fantatiskt stað. Hann gleðir seg nógv til aftur at sleppa at seta seg niður og hyggja út yvir Tórshavn, at uppliva føroysku náttúruna hesa ársins tíð og at hitta alt vinfólkið og skyldfólkið aftur.

Hann greiðir frá, at Føroyar veruliga er fari undir húðina á honum. "Føroyar er sum narkotika, og eg havi brúk fyri at fáa Føroyar í æðrarnar aftur", sigur hann. Tí er hann so øgiliga glaður um henda møguleikan."Tí annars hevði eg noyðst at tikið ein kold tyrker, fyri at halda okkum til narkotermonologiðina", sigur hann. "Bæði eg og daman hjá mær gjørdust heilt bitin av Føroyum."

*Hvussu var upplivningin at spæla á G! í summar?*

– Upplivingin í summar var heilt fantastisk. Vit vóru har í eina heila viku og upplivdu ótrúliga nógv stuttligt. Hetta var fyrstu ferð í eitt ár, at vit vóru saman sum ein bólkur uttan at arbeiða, uttan gera samrøður við miðlar, uttan spæla ella annað tílíkt. Hetta var júst eitt ár eftir, at fløgan USA/DSB kom út, og vit høvdu verið seg nógv upptiknir hetta árið. Tí var tað ein ótrúliga góð tíð fyri bólkin. Føroyar fór undir húðina á okkum øllum. Tað gjørdist ein ordiliga feit vika.

Sjálv konsertin var eisini heilt serlig. Vit høvdu alla vikuna gingið og skeitt oman á sandin, sum gjørdist størri og minni alla tíðina. Vit hugsaðu okkara, um hvussu tað fór at enda við konsertini. So fréttu vit, at flóð fór at vera, meðan konserin var. Men G! fólkini tey tóku ikki hetta so tungt. Tey høvdu ein sovorðnan herligan afturlenaðan hugburð, sum vit sóu hjá nógvum føroyingum. Tey gjørdu ikki mætari enn, at tey ringdu eftir einum sandbáti, sum kom og legði eina last av sandi. Tað var herligt.

Føroyingar eru rættiliga ymiskir frá danum. Men alíkavæl eisni eitt sindur líkir. Tað er t.d. deiligt, at man dugir at práta sama mál.

Vit høvdu onga hóming av hvussu vit fóru at verða móttiknir á pallinum, men tað gjørdist ein stór uppliving. Kanska serliga fyri meg. Hóast eg ikki dugi føroyskt, so er abbi mín úr Gøtu, og eg kenni, at Føroyar er ein stórur partur av mær. Tí byrjaði eg konsertina við at siga okkurt á føroyskum, sum eg hevði lært meg til hetta kvøldið. Tað var heilt fantastiskt at tosa føroyskt í eina mikrofon framman fyri so nógvum túsund menniskjum.

Tá vit so byrjaðu at spæla og móttøkan var so góð sum hon var. Tá gjørdist løtan ordiliga gandakend. Hatta gjørdist stutt sagt ein heilt serlig uppliving í okkara lívi, sum hevur sett seg djúpt í okkara hjørtu.

*Tit hava spælt í G! skjúrtum á tykkara konsertferð í Týsklandi, hvussu ber tað til?*

– Tað er fyrst og fremst tí, at talan er um nakrar feitar skjúrtir, men eisini tí tær hava eitt kensluligt virði fyri okkum. Vit hava nú ikki bara spælt í Týsklandi í teimum, vit hava faktiskt spælt næstan allar konsertir síðan vit spældu á G! í teimum. Tær eru vorðnar eitt slag av góðum uniformi. Tað er greitt, at tað fara tær ikki at halda áfram við at vera, tí so regluligir eru vit ikki. Men tað hevur kenst rætt higartil.

Trummuleikarin hjá okkum misti sína, og tað var eitt øgiligt baks at fáa fatur í eini nýggjari, tí tær vóru útseldar. Men ein av fyriskiparunum gav honum sína.

*Nú verður føroyskur tónleikur heiðraður á Planet Awards, kennur tú nakað til føroyskan tónleik?*

Tíanverri lá ikki serliga væl fyri at hoyra nakað serligt í summar. Men eg hoyrdi 200, teir dámdi okkum øgiliga væl. Tað var eisini orsøkin til, at vit bjóðaðu teimum við á pallin. Eg fekk eisini fløguna hjá Makrel, sum eg havi lurtað eitt sindur eftir. Harafturat havi eg luttikið á einum tiltakið í Danmark saman við Teitur í heyst. Eg kendi hann slettis ikki áðrenn, men tað, sum hann gjørdi, riggaði væl. Hann syngur fantastiska væl, hevur eina góða rødd. Tað virkar uppiborið, at hann er í uppskoti til planetina sum besti sangari.

*200 vóru á palli við tykkum á G!, kann tað hugsast, at tit aftur fara at gera okkurt saman?*

– Ja, tað kann væl hugsast, vit høvdu eina skumla ætlan um at virka sum Musclemankór hjá teimum í Vega í August. Men tað lá tíanverri ikki fyri. Men eg hevði hildið tað verið sera stuttligt at verið Musclemankór onkuntíð. Ella kanska at vit spæla onkra konsert saman.

*Nephew hevur fingið eitt ótal at heiðurslønum í Danmark, og á MTV European Music Awards vóru tit í uppskoti til ársins danska bólk. Hava tit nakrantíð verið í uppskoti til besta útlendska bólk?*

– Nei, tað hava vit ongantíð roynt áður - Tað er øgiliga stórt. Vit taka tílíkt sum eitt stórt herðaklapp. Tá vit fara á pallin, so eru vit har fyri at samskifta við áskoðaran, og tílíkar heiðurslønir eru eitt slag av aftursvari til okkara. Vit seta stóran prís uppá tað. Tí tílíkt vísir, at vit hava rakt okkurt, tað verið seg í áskoðaranum ella í einari dómsnevnd. Tað er sku' feitt.

Man kann ikki brúka tað til nakað listarligt. Eg meini so við, um vit vinna ella tapa eina virðisløn, so verða sangirnir hvørki betur ella verri. Men heiðurslønin er eitt aftursvar, og tað vermir sjálvandi. Vit eru so í øllum førum ikki ein av hesum bólkunum, sum sigur: Vit vilja ikki hava nakra heiðurslønir..... Okkum dáma tær væl, og vilja fegin hava tær. Tær eru eisini fínar at seta oman á bunkarnar av pappíri á skrivaraborðinum, so pappíri ikki fýkur um alt húsið.

Annars er tað nokkso stuttligt at vera í uppskoti saman við Madonnu og Green Day, tað er bara í Føroyum, at tað ber til. Hatta er eitt gandakent land.

*Hesuferð kemur tú til Føroyar at handa eina heiðursløn, men hvussu verður við Nephew, koma tit aftur til Føroyar at spæla?*

– Ja, tað kann eg lova tykkum, at vit koma. Tað verður ivaleyst ikki í ár. Í løtuni skriva vit eina nýggja fløgu. Eg havi fingist burturav við hetta seinastu mánaðarnar. Síðan taka vit hana upp, og tá fløgan er útkomin er konsertferð í Danmark á skránni. Men aftan á, at konsertferðin er av, so fara vit aftur til Føroyar.



*Tað var heilt fantastiskt at tosa føroyskt í eina mikrofon framman fyri so nógvum túsund menniskjum, sigur Simon Kvamm*